

# Sissal í brennideplinum



Tyskvøldið gjørdist tað tó ov nógv av tí góða hjá Sissal. Hon helt, at Big Brother setti skeivt ljós á hana og hennara ætlanir, og tí vildi hon sleppa út úr eygleidda húsinum

**Føroyska Sissal er vorðin høvuðspersónur í Big Brother sendirøðini hjá TV Danmark. Í hesi vikuni hevur hon nálgast uppi í Roberti, og tysdagin vildi hon sleppa út úr Big Brother-húsinum**

BIG BROTHER
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Hetta er ikki fyrsta ferðin, at ein føroyingur er við í eini danskari reality-sending. Men hetta er fyrsta ferðin, at ein føroyingur hevur gjørt so nógv um seg, og er vorðin til ein av høvuðspersónunum í eini reality-sending.

20 ára gamla Sissal fór fyri 26 døgum síðani inn í Big Brother húsið, og frá fyrsta degi fekk hon eyðmerkt sítt økið. Millum annað við at pissa á gólvið ta fyrstu náttina.

### Par ella ikki par

Seinastu dagarnar hevur nógv tos verið um Sissal og danan, Robert, sum er 21 ára gamal. Seinastu vikuna hava tey bæði nálgast uppi í hvørjum øðrum, og tað hevur verið lagt upp til meira enn bara eitt óskyldugt fríggj.

Seinasta hósdag varð húsið býtt upp í eina ríka og eina fátæka síðu. Sissal endaði á fátøku síðuni, meðan Robert kom yvir á ríku síðuna. Men mánadagin býttu Sissal og ein onnur genta í húsunum um pláss, so Sissal kom yvir á ríku síðuna til Robert.

Síðani hevur verið lagt upp til mangt og hvat í húsinum.

Føroyingurin hevur staðið fyri fyrsta floks sjónvarpsundirhaldi, har tosað hevur verið um mangt og hvat. Afturvendandi evnið vísir seg tó at vera sex.

### Vildi út

Tyskvøldið gjørdist tað tó ov nógv av tí góða hjá Sissal. Hon helt, at Big Brother setti skeivt ljós á hana og hennara ætlanir, og tí vildi hon sleppa út.

Kuffertið varð pakkað, og føroyingurin hevði gjørt av, at tíðin inni í eygleidda húsinum var yvirstaðin.

Men skjótt fekk Makiah, tann elsta í húsinum, tosað Sissal til rættis, og tí valdi hon at enda, at Big Brother skuldi fáa ein møguleika afturat.

### Fjølmiðlarnir við

Donsku bløðini fylgja eisini væl vid gongdini í Big Brother húsinum. Serliga Sissal og Robert tykjast at vera eitt væl umtókt evni.

Í Ekstra Blaðnum í gjár var grein um hendingina, tá ið Sissal og Robert hugnaðu sær í baðikarinum. Og til ber eisini at velja millum fleiri aðrar greinar við sama evni, og eru tað føroyingurin og tann tveir metrar langi danin, ið vísa seg at vera tað, bløðini halda vera mest áhugavert.

Men hvussu er ella ikki, so hevur Sissal við sínum atburði megnað at seta seg sjálva í brennidepilin.

Spurningurin er so bara, um hetta bert er eitt spæl fyri gallarínum fyri at fáa hendur á milliónini, sum stendur upp á spæl.

Hendan spurningin lata vit standa ósvaraðan.





## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# 40 ár síðan fyrstu skipsføraraprógvini

**21. mai 1963 var ein søguligur dagur, tá tók fyrsti skipsføraraflokkurin prógv í Føroyum**



*Aftast, f.v.: Olaf Ludvig, Tórshavn, Eilert Mikkelsen, Tórshavn, Mortan Johannesen, Tórshavn, Ernst Pauli Jakobsen, Kollafjørður, John Müller, Þorkeri Christian Djurhuus, Hvítanes, Egil Djurhuus, Kollafjørður, Jógvan Hjarni, Morskranes, John Hansen, Nes, Eysturoy.*
*Í miðjuni, f.v.: Evald Simonsen, Sørvágur, Poul Johs. Johansen, lærari, Tórarin Evensen, lærari, Petur Christiansen, lærari, Sæbjørn Jakobsen, Skopun, Hans Pauli Heinesen, Sandavágur, Jákup Lamhauge, Runavík, Hans Pauli Jacobsen, Klaksvík.*
*Fremst, f.v.: Hans Sundstein, lærari, Høgni Mohr, próvdómari, Dánjal Jákup Joensen, skúlastjóri. Teir báðir seinastu eru próvdómarar úr Danmark. Eskild Hansen, ættaður av Toftum og búsitandi í Havn, vantar á myndini.*

*Myndaeigari: Mortan Johannesen*

### Dagurin

**16. oktober. Gallus,** deyður í 640. Írskur munkur, sum læt kleystrið St. Gallen við Bodenvatnið byggja. Doyði 95 ára gamal.

## Bilsmiðir prógv á Tekniska Skúla



*Hesir átta hava fingið prógv sum bilmekanikarar á Tekniska Skúla í Havn.*
*Kristoffur Gaardlykke, Miðvágur, lærupláss, Sp/f Ivan Johansen Tórshavn, Martin Hansen, Klaksvík, lærupláss, AutoShine Klaksvík, Hans Pauli F. Jacobsen, Kolbeinargjógv, lærupláss, P/f Meinhardt Arge Tórshavn, Thomas Jensen, Hoyvík, lærupláss, Sp/f Eyðbjørn Hansen Tórshavn, Ragnvald Joensen, Skálavík, lærupppláss, P/f Wenzel Tórshavn, Tryggvi Joensen, Sandur, lærupláss, Sp/f Steintór Fagradal Sandur, Eigil Olsen, Tórshavn, lærupláss, VR-Bilar Tórshavn, Jákup Martin á Válinum, Vestmanna, lærupláss P/f D.B. Bilar Tórshavn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Bygningssnikkarar prógv á Tekniska Skúla



*Hesir fýra hava fingið prógv sum bygningssnikkarar á Tekniska Skúla í Havn.*
*Mikkjal Holm, Nólsoy, lærupláss, Sp/f Snikkaravirkið hjá A.I.K. Tórshavn, Mortan Mols Mortensen, Tvøroyri, lærupláss, P/f Bygningssnikkaravirkið BSV Tórshavn, Jens Kartin Rasmussen, Fuglafjørður, lærupláss, P/f Bygningssnikkaravirkið BSV Tórshavn, Jógvan Petur E. Thomsen, Skopun, P/f Bygningssnikkaravirkið BSV Tórshavn.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*